VARPIÐ





# Superman – Aldarinnar frumsøga

**Superman hevur eisini ymnsar samleikar. Dagliga er hann tann smædni Clark Kent – blaðmaður á blaðnum »Daily Planet«, men tá brotsmaðurin, Lex Luthor, leggur til rættis at stórt kvett, leggur Clark Kent brillurnar frá sær, letur seg í Superman-búnan og flýgur út at stríðast fyri sannleika og rættvísi. Sjónvarp Føroya vísir kenda amerikanska filmin, Suerman frá 1978 leygarkvøldið 11. januar**

Superman er ein av teimum fáu stóru frumsøgnunum úr tjúgundu øld. Í ein búna - littur sum amerikanska flaggið - fleyg hann fyrstu ferð í 1938 gjøgnum himmalin sum verji fyri sannleika, rættvísi og annars góðu amerikonsku virðini. Superman var upprunaliga skaptur sum ein teknirøðfigurur, men 40 ár seinni varð lív blást í hann á løriftinum við øllum tí, sum eitt framkomið filmsframleiðsluapparat kundi gera av triksum og spesialeffektum. »Superman« varð ein av filmsøgunnar dýrastu filmum, men samstundins ein kanónsuksé, sum varð tikin uppaftur við einum filmi afturat.

Á planetini Krypton finnur Jor-El, vísundamaður, út av, at ein stór spreinging skjótt fer at henda. Krypton verður oydd, men eingin lurtar eftir honum, og tí sendir hann son sín avstað í eini raket við kós móti fremmandu planetini: Jørðini. Tvey vanlig fólk á amerikanska fastlandinum finna dreingin, og hann veksur upp á garði teirra sum Clark Kent, men longu sum smádrongur hevur hann eginleikar, sum bróta frá øðrum. Serliga tað at hann dugir at flúgva, og at hann er so sterkur.

Sum vaksin hevur hann eisini tveir ymnsar samleikar - identitetir. Dagliga er hann tann smædni Clark Kent – blaðmaður á blaðnum »Daily Planet«, men tá brotsmaðurin, Lex Luthor, leggur til rættis at stórt kvett, leggur Clark Kent brillurnar frá sær, letur seg í Superman-búnan og flýgur út at stríðast fyri sannleika og rættvísi.

Richard Donner hevur sett filmin upp við monumentalum effektum og stórari respekt fyri frumsøgnini - mytuni - um Superman, leiktur av Christopher Reeve. Margot Kidder hevur leiklutin sum stjørnu-blaðkvinnan Lois Lane, sum hann verður skotin í, men sum hevur størri áhuga í Superman enn í smákiksaða Clark Kent.

Meðan høvuðsleikararnir í filminum vóru lutvíst ókend, so eru nógv stór nøvn at síggja í hjáleiklutum, so sum Marlon Brando, sum er pápi Superman, meðan Cene Hackman er stórbrotsmaðurin Lex Luthor, og síðani eru eisini Susannah York, Ned Beatty, Trevor Howard og Terence Stamp millum leikararnar. Harframt vilja tey, ið kenna upprunaligu sjónvarpsrøðina, kenna aftur foreldrini hjá lois Lane sum Kirk Alyn og Noel Neill – tey upprunaligu Clark og Lois.

Eftir teir fýra Superman-filmarnar varð Clark Kent yvirhálaður av Bruce Wayne, sum við harðari hond stýrdi Gotham City í teim eitt sindur døkkaru Batman-filmunum. Eisini eftir fýra Batman-filmar fóru tey at tosa um at gera nýggjan Superman-film – og enn ganga søgur um, hvør man fara at taka yvir leiklutin í Superman-búnanum eftir Christopher Reeve.